

www.oljan.fo

**Jan Müller** 23 - 04 - 2012

# Seismikkfeløgini áhuga fyri Føroyum

Hóast lítið oljuvirksemi hevur verið á føroyska landgrunninum í fleiri ár, so verður kortini rættiliga fitt av virksemi á landgrunninum í hesum árinum. Umframt boringina hjá Statoil, so verða fleiri seismiskar kanningar gjørdar. Ein teirra er júst farin í gongd. Tað er seismikkfelagið TGS, sum hevur tikið stig til rættiliga umfatandi seismiskar kanningar ymsa staðni á landgrunninum, tó mest framvið markinum. Hesar kanningar byrjaðu fyri viku síðani og halda fram í umleið tríggjar mánaðir aftrat. Tað er seismikkskipið AKADEMIK SHATSKIY, sum stendur fyri kanningunum. Oljan.fo skilur, at talan er um eitt sokallað multi client survey. Tvs. at hetta eru kanningar, sum felagið hevur tikið stig til og fer siðani at selja data til oljufeløg, sum fara at vísa áhuga fyri teimum. Hyggja vit eftir økinum millum Hetland og Føroyar so síggja vit nógv seismiskt virksemi, eitt nú skjýtur Oceanic Champion seismikk í brestskum øki, eisini nær føroyska markinum frá 10. apríl til 20. juni. At seismisk feløg vilja brúka nógvar pengar uppá at gera kanningar í økjum báðumegin markið millum Hetland og Føroyar er ein ábending um, at økið helst er áhugavert fyri oljufeløgini eisini. Kortið vísir, hvar TGS fer at skjóta seismikk í føroyskum øki, og hvar seismikkur eisini er skotin hinumegin markið.